gult24 cyan24 magenta24 svart24



## Hondbóltsúrslit

**Ikki uttan orsøk fór VÍF avstað við megin partinum av tí plássi, sum vit í blaðnum høvdu sett av til ítrótt. Tískil hevur rúmd ikki verið fyri umrøðu av hinum dystunum í fyrstu deild hjá monnum og kvinnum. Hagtølini fyri hesar dystir verða tó prentaði niðanfyri.**

**1. deild, kvinnur**
Fríggjadagin, 6. apríl
**Sóljan-Tjaldur 11-8 (5-5)**
Málskjúttar:
Sóljan: Heidi M. Akselsen 3, Arnleyg Haraldsen 2, Sólja Nielsen 2, Elspa Egilstoft 1, Jóna Gudmundsen 1, Hertha Simonsen 1, Jóhanna í Horni 1
Tjaldur: Milica Ergic 3(1), Beinta Joensen 2(1), Mona Langgaard 2, Kristina Ellingsgaard 1
Brotskøst: Sóljan 1, Tjaldur 3
Útvísingar: Sóljan 3, Tjaldur 2
Dómarar úr Neistanum: Hjalmar Petersen og Kristian Johansen

Leygardagin, 7. apríl
**Tjaldur-VB 24-27 (14-17)**
Málskjúttar:
Tjaldur: Milica Ergic 8(2), Beinta Joensen 7, Mona Langgaard 2, Turid Lamhauge 1, Kristine Ellingsgaard 1
VB: Regina Radó 8(3), Christina Holm 6, Andrea Lütz 5, Leila Jespersen 2, Gurið Mortensen 2, Eyðdis Kjærbo 2, Margreth Augustinussen 1, Mary Krosslá 1
Brotskøst: Tjaldur 3, VB 6
Útvísingar: Tjaldur 3, VB 4
Dómarar úr Kyndli: Hanus Kúrberg og Hans Thomassen

**Neistin-Kyndil 26-10 (10-7)**
Málskjúttar:
Neistin: Katrin á Neystabø 8(1), Birita Wardum 6, Annika Thomsen 6(1), Bjørg Patursson 2, Helena Dam 1(1), Súna Mørk 1, Marjun Jógvansdóttir 1, Mildrid Jacobsen 1
Kyndil: Jórun Ludvig 6, Herborg Joensen 1, Ann Hansen 1, Signhild Petersen 1, Lotte Sørensen 1(1)
Dómarar úr Stjørnuni: Geir Wardum og Carsten Andersen

**1. deild, menn**
Leygardagin, 7. apríl
**Tjaldur-KÍF 24-38 (10-18)**
Málskjúttar:
Tjaldur: Sverii Justinussen 6, Arnfinn Langgaard 6, Ragnar Olsen 4, Dánjal Kjærbo 3, Svein í Heiðunum 2, Tummas Magnussen 1, Johnny Lamhauge 1, Arngrím Arngrímsson 1
KÍF: Petur Martin Poulsen 8, Regin Petersen 8, Petur Martin Johansen 6, Jákup Dam 5, Vagnur Johannesen 4, Durica Tomic 3(2), Iljan Topic 3, Kristian Madsen 1
Brotskøst: Tjaldur 1, KÍF 5
Útvísingar: Tjaldur 4, KÍF 4
Dómarar úr Kyndli: Hanus Kúrberg og Hans Thomassen

**Neistin-Kyndil 34-26 (15-16)**
Málskjúttar:
Neistin: Jacob Jónsson 9, Kári Mortensen 8, Áki Mørk 5, Ragnar Zachariasen 4(1), Ræni Slættanes 3, Rune Møller 2, Ári Rouch 1, Karl O. Rasmussen 1, Jákup S. Kass 1
Kyndil: Bjarni Wardum 9(5), Janus E. Sørensen 6, Høgni Klein 4, Regin Petersen 2, Hanus Jensen 2, Jónleif Sólsker 1, Hans Á. D. Christiansen 1, Heini Bendtsen 1
Brotskøst: Neistin 5, Kyndil 5
Útvísingar: Neistin 2, Kyndil 5
Diskvalifikatión: Kyndil 1 (3X2 minuttir)
Dómarar úr Stjørnuni: Geir Wardum og Carsten Andersen

# Fyrsti føroyingurin í Arsenal

**Eftir at hann í fleiri umførum hevur royndarvant við Arsenal, verður 15 ára gamli Ingi Højsted nú eftir øllum at døma knýttur at enska stórfelagnum**

YRKISFÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Tað sum Todi Jónsson hevur droymt um í skjótt fleiri ár, tykist nú vera gingið út hjá bert 15 ára gamla havnardreinginum, Inga Højsted.

Hann hevur í tveimum umførum verið og vant við enska stórfelagnum, og fyri viku síðani var Ingi so aftur í Onglandi. Sum vit her á blaðnum skilja, vóru foreldur hansara og umboðsmaðurin, Jákup í Stórustovu, eisini við á teirri ferðini, og tað kundi sostat bent á, at 15 ára gamli leikarin hevur verið í Onglandi fyri at tosa um sáttmála.

Við evstamark okkara var trupult at fáa neyvt at vita, júst hvat er farið fram í málinum, men eftir øllum at døma er okkurt ítøkiligt komið burturúr ferðini.

Í øllum førum skuldi tíðindafundur verða í B36 húsinum klokkan 15.30 mánadagin, so uttan iva frætta vit meira um hetta í mikudagsnblaðnum.



*Ingi er her avmyndaður, áðrenn hann á øðrum sinni fór til Onglands at venja við enska stórfelagnum, Arsenal*

## Máltindurin:

| | | | |
|---|---|---|---|
| Ioana Rapa | VÍF | 192 | (55) |
| Simona Dziugyte | Stjørnan | 176 | (43) |
| Regina Radó | VB | 154 | (42) |
| Annika Thomsen | Neistin | 146 | (24) |
| Sóley Mikkelsen | VÍF | 133 | (43) |
| Andrea Lütz | VB | 123 | (9) |
| Lotte Sørensen | Kyndil | 122 | (58) |
| Anna K. Samson | Stjørnan | 113 | (1) |
| Jórun Ludvig | Kyndil | 113 | (16) |
| Gurið Mortensen | VB | 108 | (7) |
| Nicolina Eyðbjørnsdóttir | VÍF | 107 | |
| Fríða Marjunardóttir | VÍF | 106 | (11) |
| Beinta Joensen | Tjaldur | 101 | (13) |
| Vesna Tomajek | Stjørnan | 96 | (27) |
| Melica Ergic | Tjaldur | 91 | (27) |

Viðmerkjast skal, at hagtølini fyri dystin, Sóljan –VB, ikki eru íroknaði, tá vit enn ikki hava fingið avrit av hesum dómaraseðlinum

## Máltindurin:

| | | | |
|---|---|---|---|
| Halgir D. Olesen | H71 | 204 | (41) |
| Bjarni Wardum | Kyndil | 181 | (55) |
| Ingi Olsen | VÍF | 155 | (44) |
| Dorica Tomic | KÍF | 149 | (45) |
| Sverri Justinussen | Tjaldur | 145 | (19) |
| Artur Johansen | StÍF | 140 | (46) |
| Sámal Joensen | VÍF | 124 | (10) |
| Costin Dumitrescu | StÍF | 124 | (38) |
| Áki Olsen | VÍF | 123 | (8) |
| Jónleif Sólsker | Kyndil | 110 | (24) |
| Martin Hummeland | VÍF | 104 | |
| Jacob Jónsson | Neistin | 101 | (7) |
| Áki Mørk | Neistin | 94 | (6) |
| Kári Mortensen | Neistin | 93 | (16) |
| Alexandur Johansen | StÍF | 89 | (2) |

## Støðan 1. Deild kvinnur

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | VÍF | 12 | 12 - 0 - 0 | 713 | 386 | 327 | 36 |
| 2 | Stjørnan | 12 | 9 - 0 - 3 | 654 | 502 | 152 | 28 |
| 3 | VB | 12 | 7 - 1 - 4 | 628 | 494 | 134 | 24 |
| 4 | Neistin | 12 | 7 - 1 - 4 | 511 | 497 | 14 | 20 |
| 5 | Kyndil | 12 | 1 - 1 - 10 | 523 | 674 | -151 | 8 |
| 6 | Tjaldur | 12 | 2 - 1 - 9 | 389 | 604 | -215 | 6 |
| 7 | Sóljan | 12 | 2 - 0 - 10 | 381 | 642 | -261 | 6 |

## Støðan 1. Deild menn

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | VÍF | 12 | 11 - 0 - 1 | 764 | 575 | 189 | 34 |
| 2 | StÍF | 12 | 7 - 2 - 3 | 701 | 633 | 68 | 24 |
| 3 | Kyndil | 12 | 5 - 3 - 4 | 666 | 619 | 47 | 21 |
| 4 | Neistin | 12 | 7 - 0 - 5 | 604 | 605 | -1 | 20 |
| 5 | KÍF | 12 | 6 - 2 - 4 | 595 | 636 | -41 | 17 |
| 6 | H71 | 12 | 1 - 0 - 11 | 605 | 703 | -98 | 6 |
| 7 | Tjaldur | 12 | 1 - 1 - 10 | 552 | 716 | -164 | 6 |

## Meira í morgin

Vegna plásstrot bar okkum ikki til at hava allan tann ætlaða ítróttin við í blaðnum í dag. Tískil er umrøða av millum øðrum dystunum í kappingini um løgmanssteypið eins og umrøða av øðrum ítróttahendingum fluttar til blaðið í morgin. Vit biðja lesararnar halda okkum til góðar
jm

Sosialurin
Lesið Sosialin - tað loysir seg

www.sosialurin.fo

gult25 cyan25 magenta25 svart25






## Sernámsdepilin

# Sálarfrøðingur

Í Sernámsdeplinum er eitt nýtt starv sum sálarfrøðingur at søkja. Setanin verður frá 1. august ella eftir avtalu.

Sernámsdepilin er stovnur undir Mentamálastýrinum, sum umframt at umsita og menna sernámsfrøðiliga virksemið í undirvísingarverkinum, eisini skipar fyri og ráðgevur í sambandi við allar sernámsfrøðiligar spurningar og veitir tænastur til børn og ung í aldrinum 0–18 ár.

Í Sernámsdeplinum fer fram eitt fjøltáttað sernámsfrøðiligt- og sálarfrøðiligt virksemi. Her er serskúli fyri børn og ung í aldrinum 0–18 ár (21 ár), eygleiðingarbarnagarður fyri børn undir skúlaaldur, tali-/hoyriklinikk, taliinstitutt og annað sernámsfrøðiligt virksemi. Sálarfrøðingarnir í Sernámsdeplinum skipa saman við Landssjúkrahúsinum fyri barnapsykiatriskar konsulenttænastu. Í stovninum arbeiða eini 50 fólk.

Tann, ið settur verður, skal fyrst og fremst taka sær av ráðgeving/vegleiðing av foreldrum, lærarum, pedagogum og øðrum fakfólkum og av kanning/viðgerð av børnum og ungum.

Landsstýrismaðurin í mentamálum hevur sett eina nevnd, ið 1. okt. 2001 skal hava latið álit um møguligar skipanarbroytingar í sernámsfrøðiliga virkseminum. Tú fært høvi at vera við at seta dám á eitt fakligt øki í menning.

Útbúgvingarkrøv og eginleikar
- Cand. psyk/ cand. ped. psyk.- ella samsvarandi. Lesandi, ið væntandi fáa prógv í næstum, kunnu eisini søkja starvið.
- Fakligan førleika og hug at arbeiða bæði við kliniskt – psykologiskum og pedagogiskt – psykologiskum uppgávum.
- Duga at nýta kanningarúrslit í ítøkiligum undirvísingar- og viðgerðaruppskotum.
- Hava hug og evni at ráðgeva/vegleiða øðrum fakbólkum.
- Vitan um nervasálarlig greiningaramboð er ein fyrimunur.
- Tala føroyskt.

Hevur tú ikki autorisatión, kann Sernámsdepilin hjálpa tær at fáa hesa.

Umsókn við avriti av prógvi v.m. skal sendast til:
**Sernámsdepilin, Frælsið 32, Postrúm 2036, FO-165 Argir, og vera okkum í hendi í seinasta lagi mikudagin 16. mai 2001.**

Nærri um starvið fæst við at venda sær til Hans Eli

# Hondlesing í Tórshavn

## í døgunum 26. mai-4. juni

Hondlesarin Marita Nielsen er í Føroyum. Lesir tína hond – fortíð, nútíð og framtíð – styrki og veikleikar. Ein annaleiðis máti at síggja teg sjálvan.

Ring og bið um tíð á
**tlf. 0045 39664880** eftir kl. 16.00.




# Føroya Studentaskúli og HF-skeið

**Hoydalar**
**FO-188 Hoyvík**
Tlf. +298 312973 · Telefax +298 318624

Frá 1. aug. 2001 eru 9–10 størv sum ársvikarar í hesum lærugreinum:

**enskum, føroyskum, alisfrøði, ítrótti, latíni, støddfrøði, religión, søgu, samfelagsfrøði og týskum**

og 4–5 føst størv, treytað av lærugreinasamansetingum, leyst at søkja í hesum lærugreinum:

**lívfrøði, donskum, teldufrøði, heimspeki, alisfrøði, geografi, ítrótti, støddfrøði, tónleiki og sponskum.**

Størvini verða sett sambært sáttmála millum YF (Yrkisfelag Studentaskúla- og HF-lærara) og Føroya Landsstýri.

Umsókn á oyðublaði frá YF verður stílað til Mentamálastýrið, Tórshavn, men verður sent rektaranum: **Mads A. Winther, Føroya Studentaskúli og HF-skeið, Hoydalar, FO-188 Hoyvík.**

Avrit av prógvum ella úrskrift av próvtøkubók skal hjáleggjast.

Umsóknir skulu vera rektaranum í hendi í seinasta lagi 1. mai 2001.

veitst tú ikki tað?
Sosialurin